


Fólk og dólgar í Kardamummu:

# Allar sýningar útseldar




**Fríggjamorgunin kl 09.00 varð byrjað at selja atgongumerki til eykasýningarnar, men Ingigerð á Trøðni á Kunningarstovuni væntaði hósdagin, at eyka atgongumerkini fóru at verða skrødd burtur eftir umleið tveimum tímum**

SJÓNLEIKUR

*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

Í sambandi við leikin um Kardumummubýin, sum í løtuni gongur í Sjónleikarhúsinum í Havn, má gamla orðatakið um at sein kúgv fær skitið gras, enn einaferð ásannast.

Útselt er nevniliga longu til allar 24 sýningarnar, sum upprunaliga vóru á skránni, og av Kunningarstovuni frætta vit, at fyrstu 14 sýningarnar longu vóru útseldar 14 dagar fyri frumframførsluna.

Fríggjamorgunin kl 9 varð farið undir at selja atgongumerki til eykasýningarnar, og longu ein tíma seinni var alt útselt.

– Hetta er avgjørt met í billettsølu til nakran barnaleik. Tað er ikki hent áður, at so nógvar sýningar hava verið útseldar áðrenn leikurin yvirhøvur hevur verið frumframsýndur, sigur Ingigerð, og undirstrikar, at tað veruliga er stórur tørvur á barnaleikum.

– Sjónleikarhúsið hevur at kalla havt ein barnaleik á hvørjum ári, og um leikurin er bygdur á eina kenda søgu, so er áhugin ovurhonds. Teir verða altíð útseldir beinanvegin, sigur hon.






